**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 6 |
| Tíð: | 13-06-23 Kl. 13.30 – 14.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Petur Rouch, skrivari, Julianna Klett, kassameistari, og Marin Rasmussen, limur.

**Fundarskrá:**

1. Fyrireiking til fund við Heðin Mortensen kl. 14.00.
2. Ymiskt.

AD 1 Fyrireiking til fund við Heðin Mortensen kl. 14.00

Sambært TK er skráin henda:

”**Hvat kann TK gera fyri at bøta um korini hjá eldri borgarum, sum ikki eru røktarkrevjandi**

Her er talan um:
A: Heilsustrimbandi titøk fyri eldri.
B: Bøta um búðstaðarneyðina hjá eldri borgarum.
C: Mótrokning hjá pensjónistum í fólkapensjónini.
D: Ein betri virkandi bussleið.

Í viðtøkunum fyri Eldraráðið stendur í §2,

*stk. 2: Býráðið eigur at spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur teimum eldru.*
*stk. 3: Einstøku byráðsnevndirnar samskifta við Eldraráðið í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.*

Ongantíð enn hevur Eldraráðið verið biðið um at úttala seg um nakað sum helst.

Í viðtøkunum §6, stk. 4 stendur:

*Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt ein mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fundir undir 3 tímar.*

Hetta verður ikki fylgt, tí samsýning verður bert latin, um limir hava verið á regluligum fundi ella fundum avvarðandi mánaða. Vit mæla til, at orðingin verður broytt, so at fólkavaldir limir fáa samsýning, tá fundir verða hildnir.

Klokkan 14 møtast vit á fund við borgarstjóran. TK syrgir fyri, at fundarfrágreiðing verður skrivað.”

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

AD 2 Ymiskt

Bræv er komið frá Landsfelag Pensjónista um, at tey halda eldradag fyri pensjónistar úr øllum landinum í Havn 9. september við hesi skrá:

*"ELDRADAGUR 2023 Leygardagin 9. sept. 2023 í Dansifrøi, Tórshavn, kl. 12.00 – 20.00*

*Skrá:*

| | |
|---|---|
| *Kl. 12.00* | *Koma og søla av lutaseðlum* |
| *Kl. 12.30* | *Jógvan Johansen, formaður, bjóðar vælkomin* |
| *Kl. 12.40* | *Døgurði - Árni Gregersen verður orðstýrari. Til sangirnar spæla Hjalti Skaalum, Eyðfinnur Guðjónsson, Bjarti Skipanes og Milson Zachariasen* |
| *Kl. 13.50* | *Heðin Mortensen, borgarstjóri, ber fram heilsan* |
| *Kl. 14.05* | *Lívið sum virkin pensjónistur v. Marin Vang* |
| *Kl. 14.30* | *Skemt v. Magnus Magnussen* |
| *Kl. 14.45* | *Durita Hansen greiðir frá nýggjum tænastum frá Talgildu Føroyum* |
| *Kl. 15.00* | *Kaffi/te v. køku. Lutaseðlar verða drignir* |
| *Kl. 16.40* | *Týdningurin av venjing v. Jákup Petur Eliassen, fysioterapeutur* |
| *Kl. 17.10* | *Skemt og skrøgg úr gomlu Havnini v. Óla Breckmann* |
| *Kl. 17.30* | *Felagssangur, síðan orðið frítt* |
| *Kl. 18.00* | *Smyrjibreyð* |
| *Kl. 19.10* | *Upp á gólv v. Andreas Sigurstein* |
| *Kl. 19.40* | *Beate L. Samuelsen, forkvinna, Landsfelag Pensjónista, ber fram heilsan* |
| *Kl. 20:00* | *Jógvan Johansen, formaður, endar dagin og sungið verður "Boðar tú til allar tjóðir"* |

*Kostnaður kr. 450,- fyri hvønn.*
*Tilmelding við at rinda í Betri Banka á konto: 9181 - 363.778.8 í seinasta lagi mik. 30. aug 2023.*
*Lutaseðlar verða seldir við nógvum góðum vinningum.*
*Allir pensjónistar eru hjartaliga vælkomnir.*

*Pensionistafelagið í Havn og Landsfelag Pensjónista".*

Rímiligt er, at Eldraráðið sendir umboð til dagin.

Næsti fundur í Eldraráðnum verður hósdagin 7. juli 2023 klokkan 13 í Tilhaldinum. Her verður serligur dentur lagdur á fyrireiking til okkara eldradag í oktober. Vinarliga lesið uppleggið frá Robert um Eldradagin og komið við uppskotum og hugskotum og viðmerkingum annars.

Fundur lokin klokkan 14.00

Tórshavn 14-06-23

Petur Rouch,
skrivari